# Avtala um samsýning til kommunulæknar fyri luttøku í arbeiðsbólkum og nevndum

## §1 Avtalupartarnir

Hendan avtalan er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya, og er galdandi fyri luttøku hjá kommunulæknum í arbeiðsbólkum, nevndum og øðrum fyrisitingarligum arbeiði, sum Heilsutrygd hevur biðið kommunulæknarnar luttikið í.

Avtalan er gjørd í samsvari við § 2 í Overenskomst om almen lægegerning mellem Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya frá 1. oktober 2006.

## § 2 Endamál

Endamálið við avtaluni er at tryggja kommunulæknum eina samsýning fyri at luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum, har tørvur er á teirra serkunnleika.

Avtalan ásetur hvussu kommunulæknarnir skulu samsýnast fyri hetta arbeiðið. Samsýningin er ásett við tí í huga, at tá kommunulæknar luttaka í slíkum arbeiði í vanligari arbeiðstíð, eru teir fyri inntøkumissi í vanliga starvinum sum kommunulækni.

## § 3 Innihald

Avtalan fevnir um samsýning til kommunulæknar fyri luttøku í arbeiðsbólkum og nevndum, sum Heilsutrygd hevur biðið teir luttaka í.

Tá aðrir stovnar og aðalráð biðja kommunulæknar luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum, kunnu tey eisini samsýna kommunulæknunum eftir hesari avtaluni.

Slíkar avtalur skulu góðkennast av Heilsutrygd.

Fyri luttøku í arbeiðsbólkum og á fundum í nevndum verður veitt samsýning fyri sjálva fundartíðina.

## § 4 Samsýning

Taksturin fyri hvønn tíma tekur støði í samlaðu útreiðslunum sum Heilsutrygd hevur til veitingargjøld, umroknaði til hvønn tíma fyri hvørja kommunulæknaviðtalu. Taksturin byggir tí á ein miðal takst fyri hvørja viðtalu. Tann 1. februar 2026 er taksturin fyri tíman kr. 698,00. Taksturin verður stillaður hvønn 1. apríl, eftir útreiðslunum hjá Heilsutrygd til veitingargjøld til kommunulæknar árið fyri.

Samsýningin verður latin fyri tíð, sum er brúkt á fundum og í arbeiðsbólkum. Tó kann ongantíð verða latin samsýning fyri meira enn 8 tímar um dagin.

Fyri verkætlanir, sum krevja meira fyrireiking enn vanliga fyri fundarvirksemi, kann samsýning verða latin fyri skjalfesta fyrireiking. Skjalfesta fyrireikingin skal vera innanfyri tíðina sum verkætlanarleiðslan hevur ásett til fyrireiking, og er góðkend av Heilsutrygd, áðrenn farið verður undir fyrireikingina.

Um tað undir verkætlanararbeiðinum verður mett, at tørvur er á fleiri tímum til fyrireiking, enn tað sum verkætlanarleiðslan hevur ásett, skal hetta fráboðast verkætlanarleiðsluni, sum kann áseta hægri tímatal. Broytta tímatalið skal góðkennast av Heilsutrygd, áðrenn endurgjald verður rindað fyri hesa fyrireikingartíðina.

Taksturin fyri hvønn tíma til fyrireiking er tann 1. februar 2026 kr. 275,00. Taksturin til fyrireiking verður stillaður hvønn 1. apríl, við sama lutfalli sum taksturin fyri luttøku í arbeiðsbólkum og fundum í nevndum.

Endurgjald fyri nýtslu av egnum bili kann verða veitt sambært almennari reglugerð hjá Fíggjarmálaráðnum. Taksturin er tann 1. februar 2026 kr. 3,20 fyri kilometurin.

Endurgjald verður latið fyri útreiðslur at koyra ígjøgnum undirsjóvartunnil. Endurgjald verður latið eftir bíligasta prísi fyri hald hjá undirsjóvartunnlunum.

Skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing við Strandfaraskipum Landsins, verða endurgoldnar.

Kommunulækni, sum hevur viðtalu 15 km ella longur burtur frá fundarstaðnum, fær, umframt endurgjald fyri hvønn kilometur, eisini samsýning fyri ein tíma meira, enn fundurin varar.

## § 5 Gildiskoma og uppsøgn

Hendan avtalan kemur í gildi tann 1. februar 2026 og kann sigast upp við tríggja mánað freist, til tann fyrsta í einum mánað, tá annar parturin ynskir tað.

Vegna
Fíggjarmálaráðið

Súsanna Nolsøe
*Fulltrúi*

Vegna 13/3-26
Kommunulæknafelag Føroya

Turið Holm Johannessen
*Forkvinna*